**9. a flokkur**
**Eysturskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 5/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu** (prutl)

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
(prutl)

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 um ferðslu, sum kunngjørd við løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 30. apríl 2012, verður henda broyting gjørd:

Í § 2, III, C. litra c) verður “30 km” broytt til: “50 km”.

**§ 2.**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

**Viðmerkingar:**
Uppskotið snýr seg um at broyta hámarksferðina at koyra prutl úr 30 km/t upp í 50 km/t.

Tað er ein sannroynd, at flestu bilførarar halda prutlini, ið koyra 30 km/t, vera ein forðing í ferðsluni. Tí royna bilførarar at yvirhála, og her kunnu vandastøður standast av.

Vit heita staðiliga á háttvirda Ungdómsting at viðgera henda spurning í størsta álvara, og meta tað alneyðugt at fáa hesa broyting framda, so ferðslan kann gerast tryggari, og ”koyra” betur.

**Á Ungdómstingi, 10. februar 2014**

Laila Neshamar    Kristina Á. Jakobsen    Elin Kristina Christiansen

Jóhan S. Dahl    Johan Hofgaard    Heimi Edvardsson